# Áðrenn Hockenheim

**Formel 1 liðini hava nú hildið frí í tvær vikur, og skulu aftur í eldin á Hockenheim hetta vikuskiftið. Fonn Flog hava sent ein flokk av føroyingum niður til Týsklands til koyringina, og tey hava eina spennandi koyring í væntu**



*Michael Schumacher vann í fjør, men hevur annars ikki verið so sterkur á heimavølli*

F1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

McLaren Mercedes eru á heimabreytini hjá Mercedes, og vilja óiva fegin vísa, at teir hava tann besta bilin við tí besta motorinum. Teir eru uttan iva væl upplagdir, aftan á at Juan Pablo Montoya fekk sín McLaren bil fyrstan yvir um málstrikuna á Silverstone. Eisini megnaðarkoyringin hjá Kimi Räikkönen av einum tólvta plássi upp á triðja pláss, vísti ein sera sterkan McLaren Mercedes. Bæði á Silverstone og vikuna fyri á Magny Course gekk Mercedes motorurin hjá Kimi Räikkönen fyri í venjingunum áðrenn sjálva koyringina, hetta gevur +10 pláss í byrjunarstøðu, og Mercedes vóna ikki, at hetta hendir aftur hetta vikuskiftið á heimabreytini.

Renault eru uttan iva svangir eftir at vinna, aftan á at teirra stjørnukoyrari Fernando Alonso noyddist at taka til takka við einum øðrum plássi í seinastu koyring. Teir hava ein skjótan bil og eru á odda bæði í HM fyri koyrarar og fyri framleiðarar, og hesa støðu vilja teir ikki missa. Tí eru stig á Hockenheim sera týdningarmikil. Fernando Alonso er nú 26 stig frammanfyri Kimi Räikkönen á øðrum plássi í HM, meðan Renault eru 15 stig framman fyri Mclaren Mercedes í framleiðara kappingini.

Ferrari og týski heimsmeistarin Michael Schumacher fara uttan iva at royna at gera sítt besta, fyri at gleða týsku fjeppararnar. Schumacher vann í fjør, men hetta er annars ikki ein breyt, har hann hevur verið best, einans tríggjar ferðir hevur Schumacher vunnið her, og tað er væl minnið enn á flest øllum øðrum breytum.

Toyota koma til Hockenheim við rættuliga keðiligum úrslitum í seinastu koyringunum, men eisini við sera góðum byrjunarstøðum, sum slettis ikki eru blivnar brúktar í koyringunum. Hetta er slettis ikki nøktandi og Jarno Trulli, sum má metast sum fyrsti koyrari hjá liðnum, hevur alment funnist at liðnum. Hin Toyota koyrarin Ralf Schumacher hevur roynt at vunnið á Hockenheim, og eina heimasigur hevði uttan iva bøtt munandi um eitt sera ringt kappingarár.

Tann triðji týski koyrarin á breytini er Nick Heidfeld í Williams BMW, fyri tveimum mánaðum síðan, sá alt bjart út hjá Williams, við øðrum plássum breytini í Monaco og á Nurburgring lá fyrsti Williams sigurin í luftini, men so gekk tað knappiliga av skriðuni til, og seinastu vikurnar hevur tað als ikki verið nøktandi, liðið er vorðið eitt lið, sum endar uttan fyri stigini hvørja ferð.

Higartil hava fimm mans vunnið í ár: Giancarlo Fisichella, Fernando Alonso, Kimi Räikkönen, Michael Schumacher og Juan Pablo Montoya, tað er nokk ivasamt, at talið gerst hægri á Hockenheim, men sum altíð í formel 1 er ikki lætt at spáa, og slettis iki um framtíðina.

Í aftara enda av formel 1 bilunum eru Minardi, men hjá lílta liðnum verður ein broyting hetta vikuskiftið. Patrick Friesacher hevur ikki megna at goldið fyri at koyra seinasta triðing av kappingarárinum, og triðjikoyrarin hjá Jordan Robert Doornbos hevur fingið setrið í Minardi bilinum. Hetta hevur so havt við sær, at danski Nicolas Kiesa er vorðin triðjikoyrari hjá Jordan.

**HM fyri koyararar**

| | |
|---|---|
| 1 Fernando Alonso | 77 |
| 2 Kimi Raikkonen | 51 |
| 3 Michael Schumacher | 43 |
| 4 Jarno Trulli | 31 |
| 5 Rubens Barrichello | 31 |
| 6 Juan-Pablo Montoya | 26 |
| 7 Nick Heidfeld | 25 |
| 8 Giancarlo Fisichella | 25 |
| 9 Ralf Schumacher | 23 |
| 10 Mark Webber | 22 |

**HM fyri lið**

| | |
|---|---|
| Renault F1 | 102 |
| McLaren-Mercedes | 87 |
| Scuderia Ferrari | 74 |
| Toyota Racing | 54 |
| BMW WilliamsF1 | 47 |
| Red Bull Cosworth | 22 |
| Sauber Petronas | 13 |
| Jordan Toyota | 11 |
| BAR Honda | 9 |
| Minardi Cosworth | 7 |

**FAKTA**

**Um týsku koyringina á Hockenheim**
**Umferðir:** 67
Breytarlongd 4,574 km
**Skjótast umferð:** Kimi Räikkönen(McLaren-Mercedes)
**Longdin á koyringini:** 306,458 km
**Núverandi koyrarar sum hava vunnið á Nürburgring:** Michael Schumacher 1995 (Bennetton Renault), 2002, 2004(Ferrari), Rubens Barrichello 2000 (Ferrari), Ralf Schumacher 2001(Williams-BMW), Juan Pablo Montoya 2003(Williams-BMW).

Kelda www.forix.com

# Cieslewicz skoraði fýra mál

**Meðan U-15 dreingirnir vunnu stórt, so eydnaðist tað ikki U-17 liðnum at fáa nakað burturúr ímóti Dundee United**

U-LANDSLIÐINI
*Jóannes Hansen*

Í kvøld koma U-15 og U-17 landsliðini aftur til Føroya, eftir at tey í hesi vikuni hava tikið lut í stórari fótbóltskapping í Aberdeen.

Hósdagin spældu bæði liðini ímóti skotska felagnum Dundee United. Tað gekk væl hjá U-15 liðnum, sum vann 5-1, og tað gekk minni væl hjá U-17 liðnum, sum tapti 3-0.

Stóri maðurin á U-15 liðnum var Adrian Cieslewicz. Eftirnavnið boðar frá stórum fótbóltsevnum. Pápin spældi í síni tíð bæði við ÍF, Sumba og VB. Eldri beiggin Lukasz var sera eyðsýndur á góða VB unglingaliðnum, og nú roynir hann fótbóltsevnini á unglingaliðnum hjá Brøndby.

Tað er neyvan nakar ivi um, at tað eisini fara at verða boð eftir Adrian úr útlandinum. Hósdagin skoraði hann fýra mál í 5-1 sigrinum á Dundee United, sum kom á odda 1-0. Adrian skoraði til 1-1 í 31. minutti, til 2-1 í 32. minutti, til 3-1 í 39. minutti og til 5-1 í 70. minutti. Gilli R. Sørensen økti til 4-1 í 68. minutti.

U-17 dreingirnir fingu tvey mál ímóti sær fyrsta korterið. Tað skelkaði teir nógv, men teir fótaðu sær hampuliga væl, og tað verður sagt úr Aberdeen, at teir høvdu onkrar málmøguleikar. Dygst undan steðginum økti mótstøðuliðið til 3-0, og tað gjørdist endaliga úrslitið.